# retskan íblástur



*– Tað er fínt at duga at jonglera hundraðtals ferðir, sprakla sum Ronaldo og avlevera sum Beckham. Men uttan temperament megnar tú lítið í fótbólti. Alt, sum tú gert, má gerast við hugi og hjarta. Føroyskum fótbólti vantar saft og kraft í løtuni. Ov fáir spælarar eru sterkir og skjótir, og eg haldi, at DBU-fótbóltsskúlin í Føroyum hevur ein part av skyldini, sigur Uni Arge*




**Føroyar eru næst vánaligasta landslið í Evropa. Vit hava ikki fingið nakað stig í hvørki EM- ella HM undankapping síðan 2004. Seinastu árini hava vit raplað niður eftir styrkislistanum hjá FIFA. Í løtuni liggja vit nummar 196 – bara 11 lond eru aftan fyri okkum.**

**Sosialurin varpar komandi vikurnar ljós á keðiligu gongdina. Vit leita eftir orsøkunum til, hví tað gongur so illa í hond og spyrja hvat skal til fyri at venda óhepnu gongdini?**

**Lesið áttanda part í røðini um kreppuna í føroyskum fótbólti.**

## Ov lítið svangir eftir at vinna

Uni Arge hevði ongantíð sum fremsta sermerki at vera øgiliga tekniskur. Tað sama kann sigast um fleiri av hansara landsliðsliðfeløgum. Kurt Mørkøre var ein og Julian Johnsson ein annar. Men felags fyri hesar tríggjar var, at teir allir spældu eitt skifti uttan fyri Føroyar – við succés.

– Eg haldi, at fótbóltsspælararnir í dag eru betri tekniskt enn fremstu spælararnir fyri 15-20 árum síðan. Teir duga væl at móttaka bóltin. Teir duga eisini væl at sparka og finta. Men spælararnir í dag mugu ansa eftir ikki at gerast tekniskir dillitantar, sum bara brilliera, tá teir venja skot og avleveringar. Teir mugu eisini hugsa um at gerast kraftmiklir og snildir ítróttarmenn, sum eru svangir eftir vinna, og sum útstrála hendan viljan í dysti, tí tað er í dysti, at tú prógvar títt veruliga virði, sigur Uni Arge og heldur fram.

– Øll kappingarítrótt krevur, at tey, sum eru við, eru til reiðar at vinna. Ert tú í kapping, men grundleggjandi óttast tað stríðið, sum krevst fyri at vinna, so miseydnast tú. Hetta nevni eg, tí ofta sakni eg vinnaramentalitet á føroyskum fótbóltsliðum. Eg sakni, at spælarar vísa fastleika og sannføring, og eg sakni, at teir eru særdir, tá teir tapa. Tí haldi eg, at leiðslur og venjarar eisini skulu fara at leggja dent á mentala venjing. Vit skulu góðtaka og dyrka tað harða og rættvísa í spælarum og ikki bara tað fitta og sosiala, hóast tað sosiala sjálvandi skal rigga, sigur Uni Arge.

## Glottar í felagsfótbólti

Tá Uni Arge spældi á landsliðnum, tapti landsliðið eisini onkuntíð stórt, men tá varð ikki tosað um eitt landslið í kreppu. Tað verður tað nú, og Uni fylgir kjakinum gjølla.

– Nógv verður í dag tosað um, at fótbólturin er í kreppu, og at landsliðið stendur seg illa. Tá illa gongst, er kritikkur neyðugur. Men vit skulu ansa eftir ikki bara at finnast at, so øll verða púra mótfallin. Neyðugt er nú at fara undir uppbyggingina, eisini ta sálarligu, so vit aftur fáa nakað at gleðast um, sigur Uni Arge, sum eisini heldur, at vit hava nógv at fegnast um í føroyskum fótbólti anno 2008.

– Glottar eru avgjørt at hóma í felagsfótbóltinum í løtuni. NSÍ vann á Dynamo Tblisi í summar, og HB fekk javnt ímóti Elfsborg. B36 vísti taktiskan og kropsligan fastleika, sum fekk Brøndby at knarra, og EB/Streymur beit væl frá sær, hóast Manchester City var ein yvirmakt, vísir Uni Arge á.

Hann hevur eisini heft seg við høga áskoðaratalið kring Tórsvøll tann 17. juli í ár.

– Hvussu nógv fólk hugdu at Manchester City á Tórsvølli, spyr hann og svarar síðan sjálvur.

– 5.400 fólk! Føroyingar elska bretskan fótbólt, og tí eiga vit at heinta meiri íblástur haðani. Vit skulu skapa sterkar, skjótar og sannførdar spælarar sum teir bretsku, ið samstundis eru tekniskt og taktiskt so væl fyri sum teir føroysku, sigur Uni Arge.

**Níggjundi og tíggjundi partur í greinarøðini um kreppuna í føroyskan fótbólt koma í næstum**

